Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT

INPACT

# SUMBIAR KOMMUNA

## SUMBA

## ÁRSROKNSKAPUR

## 2010

AVRIT

# INNIHALDSYVIRLIT


| | Síða |
|---|---|
| Leiðsluátekning | 2 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 3 |
| Nýttur roknskaparháttur | 4 |
| Høvuðsyvirlit 1 | 5 |
| Høvuðsyvirlit 2 | 6 - 7 |
| Høvuðsyvirlit 3 | 8 |
| Byggibúning v.m. | 9 |
| Kommunal virki | 10 - 11 |
| Vegir | 11 |
| Skúla- og mentamál | 12 - 13 |
| Almanna- og heilsumál | 14 |
| Umsiting | 15 - 16 |
| Rentur | 16 |
| Fíggjarkontur | 17 |
| Fíggjarstøða pr. 31. desember 2010 | 18 |
| Fastognir og veðhaldsskyldur | 19 - 20 |

INPACT INTERNATIONAL

## LEIÐSLUÁTEKNING

Bygdaráðið hevur í dag viðgjørt og samtykt ársroknskapin fyri 2010 hjá Sumbiar Kommunu.

Ársroknskapurin er settur upp samsvarandi ásetingum um kommunuroknskapir.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rætta mynd av ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni og rakstrarúrslitinum. Av ognum eru bert lætt umsetiligar ognir við í ársroknskapinum, meðan aðrar ognir eru vístar aftast í roknskapinum, uttanfyri fíggjarstøðuna.

Sumba, tann 17. mai 2011

Hildur Vestergaard
borgarstjóri

Poul Erik Elnar Jacobsen

Niclas Hentze

Eyðbjørn Thomsen

Brynleif Bech

# ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

**Til bygdaráðið hjá Sumbiar Kommunu**

**Átekning á ársroknskapin**
Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Sumbiar Kommunu fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2010, sum er gjørdur eftir løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýrið.

**Ábyrgd bygdarráðsins av ársroknskapinum**
Bygdaráðið í Sumbiar Kommunu hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýrið. Henda ábyrgd ber í sær, at kommunan støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til fyri at ársroknskapur kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

**Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans**
Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum. Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at kommunan kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum kommunala fíggjarnevndin nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum kommunala fíggjarnevndin hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av kommununar ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2010 og av úrslitinum av virksemi og peningastreymi kommununar í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2010 samsvarandi løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýrið.

**Ískoytisupplýsing**
Bygdarráðið hevur samtykt eykajáttan viðv. 2010 uppá tilsamans kr. 350.000. Eykajáttanin er fíggjað við flyting millum kontur og við gjaldføri kommununar.

Tórshavn, tann 17. mai 2011

**Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT**
løggilt grannskoðaravirki

Fróði Sivertsen
statsaut. revisor

# NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

Ársroknskapurin hjá Sumbiar Kommunu fyri 2010 er uppsettur eftir løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýrið. Roknskaparhátturin og sniðið eru óbroytt, í mun til undanfarna ár.

**Alment**
Allar inntøkur verða førdar í rakstrarroknskapinum, so hvørt tær verða vunnar. Allur kostnaður, sum hoyrir árinum til, verður tikin við í rakstrarroknskapinum.

## RAKSTRARROKNSKAPURIN

**Meirvirðisgjald**
Kommunan avroknar 75% í meirvirðisgjaldi.

**Inntøkur**
Skattur er inntøkuførdur í tann mun, kommunan fær goldið ávegisgjøld. Broytingar í skattaeftirstøðunum verða bókaðar beinleiðis eftir kontuavriti frá Føroya Gjaldstovu. Desembergjaldið, sum ikki er komið fyrr enn í januar 2011, er tikið við og stendur sum eitt tilgóðahavandi í ársroknskapinum.

**Rakstrarkostnaður**
Útreiðslur verða kostnaðarførdar, so hvørt tær koma til kommununa. Vanligur rakstrarkostnaður er tíðargreinaður til roknskaparárið.

**Starvsfólkakostnaður**
Starvsfólkakostnaður fevnir um allan kostnað, sum stendst av at hava fólk í starvi. Tað er lønar- og eftirlønarkostnaður og øll sosial gjøld.

**Rentur**
Rentur eru inntøku- og kostnaðarførdar samsvarandi tilskriving.

**Millumrokningar**
Bæði til ognar og skuldar eru tiknar upp til áljóðandi virði.

## FÍGGJARSTØÐAN

**Áogn**
Áognin er tikin við til áljóðandi virði. Tapsvandi verður gjørdur upp eftir einstaklingameting og frádrigin í rakstrinum.

**Skuld**
Skuld verður tikin við til áljóðandi virði við árslok.

**Eventual- og veðhaldskyldur**
Veðhalds- og aðrar skyldur verða upplýstar í ársroknskapinum.

**Útjavningarkonta**
Útjavningarkontan er tikin við til útgangsstøðið við umleggingina av nýttum roknskaparhátti frá 1993, javnað við avdráttum og rakstrarúrslitunum í tíðarskeiðnum 1993 - 2009.

## HØVUÐSYVIRLIT 1

| | | Útreiðslur | Inntøkur | Salda | Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Rakstur** | | | | |
| 1 | Byggibúning og renov. | 812.466 | 87.300 | 725.166 | 738.012 |
| 2 | Kommunal virki | 144.958 | 0 | 144.958 | 138.500 |
| 3 | Vegir | 209.972 | 0 | 209.972 | 151.000 |
| 4 | Skúla- og mentamál | 1.328.304 | 124.823 | 1.203.481 | 1.196.000 |
| 5 | Almanna- og heilsumál | 3.503.086 | 2.276.345 | 1.226.741 | 1.861.498 |
| 6 | Umsiting | 1.767.852 | 0 | 1.767.852 | 1.375.800 |
| | | **7.766.640** | **2.488.468** | **5.278.172** | **5.460.810** |
| | **Íløgur** | | | | |
| 1 | Byggibúning og renov. | 244.745 | 0 | 244.745 | 250.000 |
| 2 | Kommunal virki | 242.711 | 0 | 242.711 | 2.325.000 |
| 3 | Vegir | 830.544 | 0 | 830.544 | 820.000 |
| 4 | Skúla- og mentamál | 692.754 | 0 | 692.754 | 500.000 |
| 5 | Almanna- og heilsumál | 2.812.804 | 0 | 2.812.804 | 3.933.040 |
| 6 | Umsiting | 3.926 | 0 | 3.926 | 55.000 |
| | | **4.827.484** | **0** | **4.827.484** | **7.883.040** |
| | **Rentur** | | | | |
| 7 | Rentur | **173.497** | **73.942** | **99.556** | **-87.000** |
| | **Fíggjarbroytingar** | | | | |
| 80 | Kassi og banki | 356.742 | 30 | 356.712 | -305.109 |
| 81 | Lántøkur og millumrokningar | 698 | 2.811.384 | -2.810.686 | -5.933.040 |
| 820 | Ognarar | 353.040 | 159.020 | 194.020 | 0 |
| 825 | Skuldarar | 0 | 3.842 | -3.842 | 0 |
| | | **710.480** | **2.974.276** | **-2.263.796** | **-6.238.149** |
| | **Avdráttir av lánum** | | | | |
| 83 | Avdráttir | **0** | **0** | **0** | **0** |
| | **SAMANLAGT áðrenn fígging** | **13.478.101** | **5.536.685** | **7.941.416** | **7.018.701** |
| | **Fígging** | | | | |
| 86 | Skattur | **935** | **7.942.350** | **-7.941.415** | **-7.018.701** |
| | **Javnvág** | **13.479.036** | **13.479.036** | **0** | **0** |

## HØVUÐSYVIRLIT 2

| | | Útreiðslur | Inntøkur | Salda | Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|
| **1** | **Byggibúning og renovatión** | | | | |
| 11 | Býarfriðkan | 19.775 | 0 | 19.775 | -53.488 |
| 12 | Ídnaður | 20.041 | 87.300 | -67.259 | 0 |
| 16 | Renovatión og hegn | 1.017.396 | 0 | 1.017.396 | 1.041.500 |
| | | **1.057.212** | **87.300** | **969.912** | **988.012** |
| **2** | **Kommunal virki** | | | | |
| 20 | Kommunal virki alment | 5.110 | 0 | 5.110 | 35.000 |
| 21 | Vatnveiting og kloakk | 210.921 | 0 | 210.921 | 2.150.000 |
| 22 | Havnir | 29.893 | 0 | 29.893 | 203.500 |
| 23 | Bátahyljar | 79.552 | 0 | 79.552 | 0 |
| 25 | Brunaumsjón | 59.255 | 0 | 59.255 | 75.000 |
| 29 | Ymiskt | 2.940 | 0 | 2.940 | 0 |
| | | **387.669** | **0** | **387.669** | **2.463.500** |
| **3** | **Vegir** | | | | |
| 31 | Viðlíkahald | 7.107 | 0 | 7.107 | 53.000 |
| 31 | Kavarudding | 14.411 | 0 | 14.411 | 0 |
| 32 | Gøtusóping | 52.274 | 0 | 52.274 | 0 |
| 33 | Gøtuljós | 136.181 | 0 | 136.181 | 118.000 |
| 34 | Vegagerð | 830.544 | 0 | 830.544 | 800.000 |
| | | **1.040.517** | **0** | **1.040.517** | **971.000** |
| **4** | **Skúla- og mentamál** | | | | |
| 40 | Skúlamál, felags | 0 | 0 | 0 | 481.200 |
| 40 | Fólkaskúlin | 1.062.062 | 95.697 | 966.365 | 481.800 |
| 41 | Onnur skúlamál | 55.430 | 0 | 55.430 | 0 |
| 42 | Frítíðarundirvísing | 57.971 | 28.962 | 29.010 | 80.000 |
| 42 | Musikkskulin | 32.605 | 0 | 32.605 | 0 |
| 48 | Ítróttur | 266.950 | 164 | 266.785 | 340.000 |
| 45 | Kirkjugarðar og mentamál | 546.040 | 0 | 546.040 | 313.000 |
| | | **2.021.058** | **124.823** | **1.896.235** | **1.696.000** |

| | | Útreiðslur | Inntøkur | Salda | Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|
| **5** | **Almannamál** | | | | |
| 50 | Pensjónir o.a. | 593.627 | 0 | 593.627 | 756.764 |
| 51 | Barnaansing | 600.825 | 0 | 600.825 | 1.048.234 |
| 55 | Heilsumál | 32.290 | 0 | 32.290 | 10.000 |
| 59 | Heim fyri eldri | 5.089.149 | 2.276.345 | 2.812.804 | 3.979.540 |
| | | **6.315.890** | **2.276.345** | **4.039.545** | **5.794.538** |
| **6** | **Umsiting** | | | | |
| 60 | Felagsútreiðslur | 412.281 | 0 | 412.281 | 644.000 |
| 61 | Kommunuskrivstovan | 410.045 | 0 | 410.045 | 457.300 |
| 62 | Kommunustýrið | 285.092 | 0 | 285.092 | 329.500 |
| 63 | Aðrar nevndir | 361.413 | 0 | 361.413 | 0 |
| 69 | Ymiskt | 302.947 | 0 | 302.947 | 0 |
| | | **1.771.778** | **0** | **1.771.778** | **1.430.800** |
| | **Rakstur og íløgur tilsamans** | **12.594.124** | **2.488.468** | **10.105.656** | **13.343.850** |
| **7** | **Rentur** | **173.497** | **73.942** | **99.556** | **-87.000** |
| **8** | **Fíggjarbroytingar** | | | | |
| 80 | Kassi og bankar | 356.742 | 30 | 356.712 | -305.109 |
| 81 | Millumrokningar og lántøkur | 698 | 2.811.384 | -2.810.686 | -5.933.040 |
| 820 | Ognarar | 353.040 | 159.020 | 194.020 | 0 |
| 825 | Skuldarar | 0 | 3.842 | -3.842 | 0 |
| 83 | Avdráttir av lánum | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | | **710.480** | **2.974.276** | **-2.263.796** | **-6.238.149** |
| | **SAMANLAGT áðrenn skatt** | **13.478.101** | **5.536.685** | **7.941.416** | **7.018.701** |
| **86** | **Skattur** | **935** | **7.942.350** | **-7.941.415** | **-7.018.701** |
| | **Javnvág** | **13.479.036** | **13.479.036** | **0** | **0** |

## HØVUÐSYVIRLIT 3

| | | Roknskapur | Ætlan |
|---|---|---|---|
| 1 | Byggibúning | 725.166 | 738.012 |
| 2 | Kommunal virki | 144.958 | 138.500 |
| 3 | Vegir | 209.972 | 151.000 |
| 4 | Skúla- og mentamál | 1.203.481 | 1.196.000 |
| 5 | Almanna- og heilsumál | 1.226.741 | 1.861.498 |
| 6 | Umsiting | 1.767.852 | 1.375.800 |
| | **Øki 1 - 6 tilsamans** | **5.278.172** | **5.460.810** |
| 7 | Rentuútreiðslur - netto | 99.556 | -87.000 |
| | **Øki 7 tilsamans** | **99.556** | **-87.000** |
| | **Øki 1 - 7 tilsamans** | **5.377.727** | **5.373.810** |
| | Íløgur | 4.827.484 | 7.883.040 |
| | | **10.205.212** | **13.256.850** |
| | Avdráttir av lánum/lántøka | -2.810.686 | -5.933.040 |
| | Fíggjarbroytingar | 0 | -305.109 |
| | | **7.394.526** | **7.018.701** |
| | Skattainntøkur | -7.941.415 | -7.018.701 |
| | **Ársúrslit** | **546.889** | **0** |

# FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

| | | t.kr. |
|---|---|---|
| **OGN** | 2010 | 2009 |
| Vøru- og tænastuáogn | 254.108 | 258 |
| Meirvirðisgjald | 272.707 | 63 |
| Tíðaravmarkingar | 649.436 | 736 |
| **Áogn** | **1.176.250** | **1.058** |
| Kassapeningur | 12 | 0 |
| Bankapeningur | 2.376.504 | 2.020 |
| **Peningur** | **2.376.516** | **2.020** |
| **OGN TILSAMANS** | **3.552.766** | **3.077** |

| | | |
|---|---|---|
| **SKYLDUR** | | |
| Vøru- og tænastuskuld | 562.184 | 706 |
| Millumrokning | 4.419 | 4 |
| Skyldug lønargjøld | 72.320 | 0 |
| Skuld til peningastovnar | 0 | 1 |
| **Stuttfreiðstað skuld** | **638.923** | **711** |
| Lán til Ellisheimið í Vági | **2.811.209** | **0** |
| **Útjavningarkonta** | **102.634** | **2.366** |
| **SKYLDUR TILSAMANS** | **3.552.766** | **3.077** |

INPACT INTERNATIONAL

## NOTA

**Fastar ognir hjá Sumbiar Kommunu**

| | |
|---|---|
| Matr. nr. 37a | 1.016 |
| Matr. nr. 227a | 385.563 |
| Skúlin í Sumba | 5.811.199 |
| Skúlin á Leiti | 471.890 |
| Heilsumiðstøðin í Vági | 956.810 |
| Læknahús í Vági | 169.697 |
| Ellis- og Røktarheim í Vági | 2.812.804 |
| Høll í Lopra | 1.875.905 |
| | **12.484.884** |

Til fastar ognir eru nýtt virðini, ið vóru 31. desember 1992 við nýggjum íløgum afturatløgdum.

**Tryggingarvirðini eru til nývirði**

Skúlin í Sumba
Skúlin á Leiti
Høll í Lopra
Guanobúðin í Lopra
Kommunuskrivstovan í Sumba

INPACT INTERNATIONAL

## VEÐHALDSSKYLDUR V.M.

**Kommunali láns- og veðhaldsgrunnurin**

Sum trygd fyri kommunuavtaluni eru 55,6 mió.kr. av inngoldna peninginum veðsettar.

Innistandandi í grunninum er tískil lutvíst veðsett.

**Interkommunali Renovatións Felagsskapurin**

Við innlimingini í I.R.F. ábyrgist kommunan pro rata saman við limakommunum í mun til íbúgvarartalið fyri øllum útreiðslum og ábyrgdum felagsins.

**El-felagið S.E.V.**

Við limaskapi ábyrgist kommunan solidariskt fyri øllum skyldum, felagið átekur sær.